# Sosialurin


ÚTBJÓÐING

## Norðskálatunnilin – tekniskar innleggingar

Við hesum verður arbeiðið at gera tekniskar innleggingar í Norðskálatunlinum boðin út í almenna lisitatión.

**Arbeiðið fevnir um:**
at gera veit, leggja sterkstreymskaðal og drenleiðing gjøgnum tunnilin, seta vega- og eftirlitsbrunnar upp og binda hesar í drenleiðingina.

Arbeiðið skal vera liðugt 1. oktober 2005.

**Høvuðsnøgdirnar eru áleiðis:**

| | |
|---|---|
| - grava og fylla veit | 1610 m3 |
| - brekka, skjóta og fylla veit | 450 m3 |
| - leggja drenleiðing | 2516 m |
| - leggja sterkstreymskaðal | 2516 m |
| - uppsetan av vega- og eftirlitsbrunnum | 66 stk. |

Lisitatiónin verður á Landsverki, Tinghúsvegi 5, FO-100 Tórshavn týsdagin 7. juni 2005, kl. 11.00.

Ástaðarfundur verður mánadagin 6. juni 2005, kl. 10.00. Møtt verður við tunnilsmunnan oman fyri Norðskála.

**Útbjoðingartilfarið kann bíleggjast frá**
Landsverk
Tinghúsvegur 5
Postsmoga 78
FO-110 Tórshavn
Telefon: 31 13 33

frá 24. mai til í seinasta lagi 27. mai 2005 og verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar kr. 2.000, íð verður at flyta á konto nr. 134.228.4 í Føroya Sparikassa. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent óskalað í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land


# Ultimative ART Rokk show í Margarinfabrikkini

**Í kvøld, leygarkvøldið, verður aftur skrúvað frá elektrisku tónunum á Margarinfabrikkini. Ikki minni enn seks nøvn eru á skránni: The Headliners, The Story Ends, Paradox, Ineptus, Jákup Eli, Fólkayvirlitið**




KONSERT

Tað er ART sum setur hol á summarskránna, ið gongur undir heitinum Road Show 05. Sum virknasta rokkumhvørvið í landinum, hevur ART avgjørt, at summarið 2005 ikki skal vera keðiligt. Ætlanin er at hava tiltøk í býnum. Hesi tiltøk fevna um bæði tónleik og annað undirhald, sum kann fáa eitt sindur av futti í ungdómin í Havn.

**The Headliners**
Er eitt samanrenn av navnframu 48 Pages, tí vælumtøkta D J Switch og Andreas trummara (eisini við í The Story Ends og Fólkayvirlitið). Bólkurin spælir,sum tann fyrsti av sínum slag í Føroyum eitt sera spennandi bland av heavy, pop og scratch.

**The Story Ends**
Við sínum heilt egna og sermerkta tónleiki varta The Story Ends upp við einum Showi, sum ikki kennir sín líka her á landi.

**Paradox**
Sera virknu Paradox hava endiliga eina løtu fría, teir kunnu brúka í heimliga umhvørvinum.

**Ineptus**
Spildur spren nýggjur bólkur. Teir fimm ungu mennirnir hava spælt saman í eitt hálvt ár. Tað er fyrstu ferð, at teir trýna á pallin saman,við teirra harða rokki.

**Jákup Eli**
Við sínum sermerkta stíli hevur Jákup Eli áður undirhildið fjøldini.

Hesu ferð hevur hann lovað ikki at syngja for fúlar sangir. Men ætlar at finna nakrar av teim góðu gomlu klassikarunum fram.

**Fólkayvirlitið**
Ætlar sum ikki eina ferð at diska upp við einum showi, sum peikar frammeftir, í einum retroperspektivum upplivilsi. Sum teir siga: »Vit liva í einum kontrollsamfelag, tí mugu vit kýta okkum«.


## Lærlingur til Telebúðina í Tórshavn

"Nógvir vegir eru upp á fjallatindin, men útsýnið er altíð tað sama"

Kinverskt orðatak



**Søkt verður eftir lærlingi at læra til smásøluatstøðing til Telebúðina í Tórshavn skjótast gjørligt.**

Telebúðin í Tórshavn er ein av seks telebúðum kring landið. Telebúðirnar hava ment seg munandi seinastu árini, og ætlanirnar fyri framtíðina eru stórar. Til handilin í Tórshavn søkja vit eftir einum lærlingi, sum skal luttaka í øllum uppgávum, ið skulu til fyri at viðskiftafólkið fær eina góða tænastu.

Til rætta fólkið hava vit eitt sera spennandi læarupláss.

**Til læruplássið ynskja vit eitt fólk við:**
- førleika at seta seg inn í nýggja tøkni
- evnum at samstarva við ymiskar samstarvsbólkar
- ídni at røkka ásett mál
- HH, HF, HT ella studentsprógvi

**Lærutíðin er:**
- 2 ár við HH
- 2 ár og 18 vikur við studentsprógvi, HF ella HT

Lønin er sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.
Telebúðin í Tórshavn er opin allar vanligar handilstíðir og arbeitt verður í skiftum við hini starvsfólkini í handlinum.

Gjøllari upplýsingar fáast við at venda sær til Hildibjart Hansen á tlf. 30 30 30 ella til Starvsfólkadeildina á Føroya Tele.

Umsóknir skulu verða Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 6. juni 2005 og skulu sendast til

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Fjarskiftisøkið mennist sera skjótt, og hetta setur stór krøv til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja vera við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!